# Eitt boð upp á framtíðar vælferðarsamfelagið

*Neyðugt er tí at seta eitt trivnaðar- og heilsuráð at arbeiða burturav við hesi avbjóðing, halda Páll á Reynatúgvu, Finnur Helmsdal, Tórbjørn Jacobsen, Jóanis Nielsen, Rúna Sivertsen, Jákup Sverri Kass og Jenis av Rana sum hava lagt uppskot fram*

Ólavur í Beiti

– Ráðið skal gera eina útgreining av føroyska almanna- og heilsuverkinum og gera uppskot til eina langtíðarætlan við tí endamáli at tryggja eitt høgt og nøktandi støði á almennu, føroysku vælferðartænastunum. Endamálið skal vera at hava einfaldar og gjøgnumskygdar skipanir, ið kunnu umsitast rættartrygt so nær borgarunum sum gjørligt. Heitt verður á landsstýrismannin um í lógaruppskotinum at skjóta upp tal og samanseting av nevndarlimum og at gera útgreinaðan arbeiðssetning fyri ráðið, ið tó ikki skal fevna um bygnaðin í heilsuverkinum, er uppskotið hjá áður nevndu løgtingslimum.

Og í viðmerkingunum verður m.a. sagt, at nógvir føroyingar tykjast enn halda, at danski statskassin rindar beinleiðis fyri almanna- og heilsuøkið. Men, sum m.a. verður víst á í Hvítubók, er einki beinleiðis samband millum blokkstuðulin (heildarveitingina) og hesi øki. Heildarveitingin verður ikki regulerað eftir nøkrum staðfestum tørvi í føroyska almanna-, heilsuella skúlaverkinum, men er hinvegin ein inntøkupostur á fíggjarløgtingslógini saman við skattum, avgjøldum o.ø. Sostatt mugu føroyskir politikarar raðfesta almanna- og heilsumál á fíggjarlógini saman við øllum øðrum játtanum.

### Ongantíð viðgjørt

– Samlaðu útreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini fyri ár 2000 eru kr. 2.834.798. Av hesum eru í alt kr. 1.399.723 játtaðar til trivnaðarmál, harav kr. 1.023.841 til almannamál. Hóast hesar alstóru og grundleggjandi broytingar er almanna- og heilsuøkið ongantíð viðgjørt og nágreiniliga lýst.

– Øll lond, sum vit vanliga samanbera okkum við, eru farin í holt við at endurskoða sínar vælferðarskipanir til tess at skapa trygd og rættvísar skipanir fyri framtíðina. Føroyar hava allar fortreytir fyri at læra av royndum hjá øðrum og seta skjøtil á síni egnu boð upp á framtíðar vælferðarsamfelagið - ið møguliga eisini onnur lond kunnu læra av.

– Neyðugt er tí at seta eitt trivnaðar- og heilsuráð at arbeiða burturav við hesi avbjóðing. Ráðið eigur at gera eina gjøgnumgangandi lýsing og viðgerð av almannaøkinum og tí partinum av heilsuverkinum, ið ikki hevur við sjálvan bygnaðin at gera. Serligur dentur skal leggjast á, hvussu almannaverkið kann skipast eftir føroyskum fortreytum, og hvussu tað kann skipast í nærumhvørvinum hjá borgarunum.

– Ráðið skal ikki viðgera sjálvan bygnaðin í heilsuverkinum, men tað skal útgreina, hvørjar uppgávur heilsuverkið skal røkja. Somuleiðis skal viðgerast, hvussu heilsuverkið umframt sjúkrarøktina eisini kann røkja fyribyrgjandi uppgáv-ur.

Og Páll á Reynatúgvu, Finnur Helmsdal, Tórbjørn Jacobsen, Jóanis Nielsen, Rúna Sivertsen, Jákup Sverri Kass og Jenis av Rana mæla til, at ráðið skal arbeiða skjótt soleiðis, at tað kann lata frágreiðing sína, úr hendi í seinasta lagi 31. desember 2001. Neyðuga játtanin verður somuleiðis at fylgja við lógaruppskotinum.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

# Dagrøktarbørn nýtt sum marknaðarføring

*Forkvinnan í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býrað heldur tað vera misnýtslu av børnunum, tá dagrøktarmammur heita á fyritøkur um stuðul til keyp av búnum og fáa lýsingarpláss afturfyri*

John Johannessen

– Dagrøktarskipanin er ein almenn tænasta. Hon er ikki ein tænasta, ið skal fíggjast við lýsingum.

Hetta er greiða áskoðanin hjá Elini Lindenskov, forkvinnu í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð, í sambandi við, at dagrøktarmammurnar í Havn hava boðið fyritøkum at stuðla keypi av búnum til teirra og fáa lýsing á búnan afturfyri.

Høvuðsgrundgevingin, dagrøktarmammurnar vísa fyritøkunum á, fyri at fáa tær at stuðla er, at lýsingarnar óvivað koma at síggjasr ofta aftur á Havnargøtum, tá tær mongu dagrøktarmammurnar eru úti við børnunum.

Hetta heldur Elin Lindenskov vera misnýtslu bæði av børnunum og almennu dagrøktarskipanini.

– Eg kenni einki til hesar umsóknir, men eg ætli mær at kanna málið. Tað ber nevniliga ikki til, at smábørn soleiðis verða misnýtt sum søluvøra, sigur Elin Lindenskov.

Forkvinnan í sosialu nevnd vísir á, at skulu dagrøktarmammurnar hava eyðkennisbúna, hevði verið heilt náttúrligt, at tað á búnunum stóð »Dagrøktarskipanin hjá Tórshavnar býráð« ella okkurt líknandi. Men hon leggur dent á, at lýsingar ikki skulu á slíkan búna.



*Elin Lindenskov, forkvinna í Sosialu nevnd Tórshavnar býráðs*

Elin Lindenskov sigur á, at ynskja fyritøkur at stuðla barnaansingini í kommununi, eiga tær at gera tað á annan hátt, enn at seta lýsing á ryggin á dagrøktarmammunum.

– Barnaansingin er jú til stóran fyrimun fyri arbeiðsgevararnar. Tað eru barnagarðarnir, ið skapa fortreytir fyri, at foreldrini kunnu fara til arbeiðis. Tí kunnu fyritøkur heldur lata pening til at byggja ansingarstovnar fyri.

Forkvinnan í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð sigur seg rokna við, at dagrøktarmammurnar ikki hava hugsað seg nóg væl um, áðrenn umsóknin er send út. Og í sama sambandi vísir hon á, at hon heldur, at føroyingar eiga at kjakast meira um, hvat er siðsemiliga rætt og ikki – eisini í sambandi við slík mál, sum hetta.

# Stuðulin til fiskaflutning halda fram

*Játtanin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2000 er 3 mió. kr., og Jørgen Niclasen miðar ímóti at lække stuðulin og áseta nærri broyting í verandi kunngerð sum skjótast*

Ólavur í Beiti

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, hevur nú lagt broytingaruppskot til galdandi lóg um flutning av fiski. Í viðmerkingunum verður sagt m.a., at lógin um stuðul til flutning av fiski hevur til endamáls at javnstilla fiskakeyparar, sum bjóða uppá heila last ella partar av last, sum neyðugt kann verða at flyta til virkingar yvir fjørð ella sund. Henda lógin varð seinast broytt á vári 1999.

– Hesar broytingar førdu m. a. við sær, at í mun til frammanundan kundi stuðul ikki latast, um fiskurin var seldur um uppboðssølu og landaður t.d. á Eiði ella á Tvøroyri. Uppskotið førir nú við sær, at hetta aftur verður møguligt, t.v.s. hevur skip selt um telefonuppboðssølu, so kann veitast stuðul til flutning frá landingarstað til virki í økjum, har firðir ella sund skilja, sigur Jørgen Niclasen.

### Til 31 desember

Jørgen Niclasen sigur eisini í viðmerkingunum, at seinasta ár samtyktið løgtingið at lata stuðul til flutning av feskum virkaðum fiski og virkað livur og rogn frá virki til avskipingarhavn, har firðir ella sund skilja. Hetta í eini roynd at javnstilla virkir í útjaðarunum við virkir á meginøkinum. Í viðmerkingunum í álitinum frá vinnunevndini varð sagt, at hetta »bert skal vera galdandi i eini royndartíð, og verður tá tikin støða til spurningin, um stuðulin skal halda fram.« Hetta samtykti løgtingið, og er henda royndartíðin nú úti. Virkir í Sandoynni og Suðuroynni hava gjørt brúk av ásetingini.

Og Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, metir, at hetta er í tráð við setning samgongunnar um útjaðaran og mælir tí við hesum uppskoti til, at royndartíðin verður longd til 31. desember 2000.

Játtanin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2000 er 3 mió. kr., men tað er ikki nóg mikið nú royndartíðin verður longd. Og til tess at fáa munin miðar fiskimálaráðharrin ímóti at lække stuðulin og áseta nærri broyting í verandi kunngerð sum skjótast.



*Lógin um stuðul til flutning av fiski hevur til endamáls at javnseta fiskakeyparar, sum bjóða uppá heila last ella partar av last, sum neyðugt kann verða at flyta til virkingar yvir fjørð ella sund, verður sagt í viðmerkingum til uppskotið um at lække stuðulin til flutning av fiski*

### Frystigoymslur

Henrik Old hevur lagt uppskot fram eisini viðvíkjandi flutningi, men tað er um at javnstilla frystigoymslur í útjaðaranum við somu goymslur í miðstaðarøkinum.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Henrik Old, at tað kostar í dag umleið 0,35 kr. pr. kg. at flyta frystivørur frá útjaðaranum til miðstaðarøkið, meðan tað bara kostar umleið 0,10 kr. pr. kg. at flyta frystivørur frá frystigoymslu til framleiðsluvirki í meginøkinum.

Og Henrik Old metir, at útreiðslurnar av uppskotinum skulu liggja innan fyri verandi játtan til flutningsstuðul á fíggjarlógini.



# Kundarnir rýma frá Skipafelagnum

*Fleiri innflytarar, sum í nógv harrans ár hava brúkt Skipafelagið, sum flutningsfelag, eru farnir til onnur feløg, tí teir eru ónøgdir við tænastuna. Ov nógvar seinkingar og ov nógv spill er høvuðsorsøkin til at kundarnir rýma*

Sveinur Tróndarson

Seinastu tíðina hevur Skipafelagið Føroyar mist fleiri av gomlu flutningskundum sínum til onnur flutningsfeløg.

Orsøkin, sum serliga gongur aftur er, at kundarnir eru ónøgdir við tænastuna hjá Skipafelagnum og tí hava kundarnir valt at hyggja eftir øðrum flutningsmøguleikum.

### Ov stórt spill

Ein av kundunum, sum hevur fingið sær annan flutningsveitara er Miklagarður í SMS.

Niels Mortensen váttar fyri Sosialinum at so er, og hann sigur høvuðsorsøkina verða at tað var ov stórt spill og ov nógvar seinkingar hjá Skipafelagnum.

– Tann skipanin, sum Skipafelagið brúkar ger, at pallarnir verða lyftir upp og av bilum alt ov ofta. Hetta hevur við sær vanda fyri skaðum og tað hevur verið ein trupulleiki hjá okkum, sigur Niels Mortensen.

Seinkingarnar er ein annar trupulleiki.

Tað er eingin loyna, at veðrið seinastu mánaðirnar ikki hevur verið so lagaligt og tað eru skipini tey fyrstu at kenna sviðan av.

– Tað er rætt. Tíverri er tað alt ov ofta komið fyri, at skipini eru komin ov seint í havn og tað merkir, at vørurnar hjá okkum ikki eru til taks í handlunum tá vit lata upp. Hetta merkir í fyrsta umfari, at vit missa inntøkur og í øðrum umfari, at kundarnir vera ónøgdir, sigur Niels Mortensen.

Tí hevur SMS gjørt av, framyvir at flyta vørurnar við Smyril Line.

### Skaðar og ábyrgdarplasering

Niels Mortensen sigur við Sosialin, at Smyril Line hevur ein flutningshátt, sum passar betri inn í skipanina hjá Miklagarði enn tann, sum Skipafelagið kundi veita.

– Nú verður vøran koyrd í eina byngju frá veitaranum og eingin trukkur ella krani er á henni fyrr enn hon stendur í túninum hjá okkum. Tað merkir m. a. at vit hava færri skaðar og eisini at vit kunnu plasera ábyrgdina fyri teir skaðar, sum koma á vøruna, sigur Niels Mortensen.

Hann vísir m. a. á, at ein evropapallur kostar millum 80 og 100 krónur og fer bara ein flís av pallinum, skal endurgjald latast.

### Góða flutningsskipan

Tá vit spyrja Niels um tað kortini ikki eru ampar av, at Miklagarður hevur skift flutningsveitara, sigur hann, at tað als ikki vigar upp í móti vinninginum.

– Vit eru nú noyddir til at flyta Ný Sælendskt kjøt inn í stórum, men tann trupulleikin er so lítil, tí vit brúka frystigoymsluna í Runavík til tað endamálið. Av tí at vit kortini senda ein bil til Runavíkar hvønn dag, so hevur henda skipanin ikki eykakostnað við sær. Bilurin koyrir allíkavæl, sigur Niels Mortensen.

Hann leggur afturat, at tað stutta av tí langa er, at logistikkskipanin nú passar betri við Smyril Line sum veitara enn við Skipafelagnum Føroyar.

### Fjord var dropin

Seinkanir hava sum nevnt verið ein trupulleiki, sum Skipafelagið og kundarnir hava havt at drigist við.

Veðrið hevur ikki verið til vildar og so kom sjálv ólukkan.



*SMS og fleiri aðrir gamlir kundar hjá Skipafelagnum eru seinastu tíðina rýmdir til onnur flutningsfeløg, tí teir eru ónøgdir við tænastuna. – Seinkingar og spill eru høvuðsorsøkin, sigur Niels Mortensen, úr SMS* **savnsmynd**

Skipafelagið hevði leigað Fjord til at sigla við farmi til Føroya og tann eina túrin mátti skipið í illveðrið leggja upp í Hetlandi.

– Tað var dropin, sum fekk tað at flóta yvir. Sjálvandi kunnu øll vera óheppin, men tað var líka nógv mátin alt var handfarið upp á, sum spældi inn,s igur Niels Mortensen.

Hann er ikki einsamallur um kritikkin, tí fleiri aðrir innflytarar, sum Sosialurin hevur tosað við, siga tað sama.

Poul Michelsen er ein teirra og hann sigur, at teirra trupulleiki eru tær fesku vørurnar.

### Missa tríggjar dagar fyri ein

– Hjá okkum er trupulleikin at verður skipið hjá Skipafelagnum seinkað ein dag, so missa vit fleiri dagar. Okkara útkoyring er soleiðis samansett, at vit koyra út tríggjar ferðir um vikuna og tað merkir so, at verður skipið seinkað, so missa vit í søluni, sigur Poul Michelsen, stjóri.

Hann leggur tó dent á, at hansara fyritøka ikki hevur kvett samstarvi við Skipafelagið, men hevur flutt ein part av vøruni til annað flutningsfelag.

– Tað er soleiðis, at feska vøran hevur eina sølutíð upp á 15-20 dagar og fyri hvønn dag teir vera seinkaðir, missa vit eini 20-25 prosent av okkara sølutíð fyri vøruna. Tí hava vit valt at flyta við einum øðrum felag, sum kemur fyrr á Havnina og tað hevur riggað væl. Turru vørurnar verð enn sum áður fluttar við Skipafelagnum, sigur Poul Michelsen.

# Vit royna at betra okkum

*Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum Føroyar, sigur at teir eru greiðir yvir at teirra skip ofta hava verið seinkað í seinastuni, og tað royna teir at gera nakað við*

Sveinur Tróndarson

– Tað er ein trupulleiki, sum vit eru greið yvir og tað er eingin, sum skal ivast í, at vit royna at gera nakað við trupulleikan.

Orðini eigur Árni Joensen, sum er stjóri á Skipafelagnum Føroyar og hann sigur tey í sambandi við, at fleiri av kundum Skipafelagsins eru rýmdir.

– Tað er atlíð keðiligt, tá ein fyritøka missir kundar, men soleiðis er tá tað er kapping millum fleiri fyritøkur, sigur hann.

Árni leggur kortini dent á, at trupulleikin eftir hansara meting als ikki er so stórur, sum onnur vilja gera hann til, tí nøgdin, sum teir hava mist er so lítil sammett við samlaðu flutningsnøgdina.

– Tað svarar til 2 ella 3 prosent, sigur hann.

### Mugu betra okkum

Tað er tó einki yvir at dylja, at Árni er keddur um, at kundarnir rýma.

– Eg kann ikki gera viðmerkingar til hvønn einstakan kunda, men sjálvandi eiga vit at gera alt vit eru førir fyri, fyri at betra okkum. Men vit vera eisini noydd til at hyggja at búskaparliga partinum av tí, og tað gera vit, sigur hann.

*Tit eru í løtuni ikki førir fyri at flyta trailarar á sama hátt sum eitt nú Smyril Line. Kann tað hugsast at tit fara at gera íløgur í eitt Ro-Ro-skip?*

– Sum eg segði í áðni, so skal tað takast við í eina heildarmeting. Tað skal jú hanga saman fíggjarliga tað heila. Men tað er klárt, at sigur marknaðurin, at tað er tørvur á einum Ro-Ro-skipið, so nyttar einki, at vit siga, at tað er tað ikki. Soleiðis er tað einaferð tá tað er kapping, men eg fari ikki at taka støðu til beint nú, um vit fara at gera eina tílíka íløgu, sigur hann.

### Koma og fara

Hóast Árni er vónbrotin av missinum, so staðfestir hann enn einaferð, at tað er ein partur av livikorunum hjá fyritøkum í kapping.

– Tá til stykkis kemur, er tað ofta ein spurningur um pengar, og tað rokni eg eisini við, at tað er í hesum førinum. Vit mugu bara staðfesta, at vit vóru serstakliga óheppin fyrr í ár, og serliga við Fjord, sum vit leigaðu. Mátin vit loystu tann trupulleikan uppá var kanska heldur ikki tann rætti, og tað spælir nokk eisini inn. Hinvegin er tað ikki ókent hjá okkum, at kundar koma og fara, og hetta er ikki stórt øðrvísi í so máta, sigur Árni.

– Men tað sigur seg sjálvt, at vit mugu vera vakin og alla tíðina syrgja fyri at betra okkum, og tað gera vit, sigur Árni Joensen at enda.



*Árni Joensen, stjóri*



*Keypsamtøkan flytir enn sum áður sínar vørur við Skipafelagnum, men teir viðganga, at tað hava verið alt ov nógvar seinkingar í seinastuni* **Savnsmynd**

# – Vit eru ikki rýmdir

*FK og FD handlarnir halda fast við Skipafelagið sum flutningsveitara. FK sigur tó, at seinkingarnar eru ein trupulleiki*

Sveinur Tróndarson

Hóast nakrir av gomlu kundunum hjá Skipafelagnum eru farnir til aðrar flutningsveitarar, so eru ikki allir farnir.

Sosialurin hevur tosað við tvær fyritøkur, sum eru stak væl nøgdar við tænastuna og tí halda seg til Skipafelagið.

Birgir Poulsen, frá FD-handlunum sigur við Sosialin, at teir eru serstakliga væl nøgdir við tænastuna og at teir ikki hava merkt so nógv til spill og skaðar.

– Hartil kemur, at Skipafelagið hevur eitt gott net kring landið og tað er ein tænasta, sum eingin annar kann veita. Og vit flyta nógva vøru inn hvørja viku.

Finn Nielsen frá FK sigur, at teir sum heild eru væl nøgdir.

– Vit hava brúkt Skipafelagið í nógv harrans ár og vit hava havt eitt gott samstarv. Men tað er rætt, at teir hava havt nógvar seinkingar í seinastuni. Tað er óhappið, men vit flyta enn við teimum, sigur Finn Nielsen.

Spurdur um tað tí er vandi fyri, at eisini teir fara at skifta sigur hann, at tað hava teir ikki tikið støðu til.

– Vit brúka Skipafelagið, enn sum áður. Bæði hesa vikuna og næstu, sigur hann.